# Føroyar í altjóðagerðini

Val



EDITH DAHL
á lista C

Altjóðagerðin, sum Føroyar, við Javnaðarflokkinum á odda, skal luttaka í, er avgerandi fyri framtíð Føroya. Fyri føroysku altjóðagerðini er umráðandi, at vit hava beinleiðis ávirkan og kunnu taka avgerðir í uttanríkispolitiskum málum. Fólkatingssessurin er fremsta amboðið til tess at vinna Føroyum størri ávirkan á egnan uttanríkispolitikk og harvið náttúrliga luttøku í altjóðagerðini.

Norðurlandasamstarvið, við sjálvstøðugari umboðan í ráðnum, er eins sjálvsagt og umráðandi.

So leingi Danmark rekur uttanríkispolitikk Føroya og so leingi Føroyar ikki hava sjálvstøðuga umboðan sum fullgildugt limaland í m.a. Norðurlandaráðnm, verður luttøka Føroya í altjóðagerðini ikki nøktandi.

Sum virkið fólkatingsumboð fyri Javnaðarflokkin fari eg, at leggja áherðslu á at fáa framt neyðugu broytingarnar á økinum, og fari í uppsøkjandi og jaligum samstarvi við danskar politikarar og myndugleikar at arbeiða fyri hesum málum, sum eru altavgerandi um vit ikki skulu detta niðurímillum í alsamt vaksandi altjóðagerðini.

# Umbering

Val



RÓALDUR JÁKUPSSON
HD/U, vinnurekandi
Tjóðveldi

Undirritaði skal hervið geva eina treytaleysa umbering til Tjóðveldi og til fólk og trúarbólkar, sum av órøttum verða rakt av míni grein "Kjak um Guð", sum stóð prentað undir valgreinum í Sosialinum 6. november 2007.

Hetta vóru hugsanir, sum bara standa fyri mína egnu rokning, og sum bara eg taki ábyrgd av. Eg ætlaði at fáa kjakið um átrúnað, sum m.a. gongur fyri seg inni á kjak.fo fram í ljósið, tí eg haldi tað er eitt áhugavert og týðandi kjak um átrúnað í almenna rúminum. Men tað var skeivt av mær at risikera at generalisera trúarbólkar og samkomustøð út frá anonymum innleggum í kjakinum, og at gera hetta til partapolitiskt kjak.

Og tað var heilt skeivt at seta hetta í samband við, at eg eri politiskt valevni fyri Tjóðveldi, og at tað er sett fram undir eini "politikara-kasjett". Tað var ikki ætlanin at hetta skuldi vera ein valgrein. (Eg sendi eisini greinina til Dimmu, men tá tey boðaðu mær frá, at hon fór at standa sum valgrein, tók eg hana aftur).

Eg eri sjálvandi greiður yvir, at Tjóðveldi hevur sum grundvirði at gera greiðan skilnað millum politikk og átrúnað, og at tryggja trúarfrælsið og rættin at virka í og eftir síni trúgv uttan nakra politiska uppíblanding ella trýst.

Eg eri eisini greiður yvir, at eg nú havi risikerað at gjørt akkurát tað, sum Tjóðveldi hevur ávarað um og stríðst ímóti: At gera átrúnað og trúarlív til ein politiskan spurning, sum politikarar skulu leggja seg út í og taka avgerðir um.

Og eg eri greiður yvir, at hetta er vatn á mylluna hjá teimum, sum vilja brúka hetta móti Tjóðveldi politiskt, og sum vilja dyrka tær prinsippiellu og djúpu konfliktir, sum hava verið um átrúnað og politikk tey seinastu tvey árini.

Tí eri eg veruliga harmur um at hava rakt øll tey, ið ikki skuldu rakast við míni grein, og at tað kjakið, eg vildi reisa, nú kann vendast helt skeivt og raka skeivt.

# Ein nýggj byrjan

PALLI DALSGAARD

**Tey fimm punktini hjá javnaðarløgtingsmanninum John Johannessen hava lítið við uppruna-meiningina hjá Javnaðarflokkinum at gera**

Okkara nógv virdi løgtingsmaður, Jóan Petur Davidsen, var vanur at siga, at Javnaðarflokkurin var ein danskt venligur flokkur. Og tað hevur flokkurin altíð verið.

Sjálvandi skal flokkurin ikki standa í stað. Tað kunnu vit við góðari samvitsku siga, at hann sanniliga ikki hevur. Flokkurin hevur á øllum økjum flutt seg til tað betra hesi árini, síðani hann var stovnaður. Og verið undangongu flokkur í nógvum av tí framburði, ið er hendur seinastu árini.

Hasin hugsunarháttur, John Johannessen, førir fram, er so nær loysinginin, sum hann kann vera. Tá vit eru leys av donsku grundlógini og komin undir ta føroysku hjá Høgna Hoydal, sum Kristian Magnussen tíbetur hevur beint fyri, fyri eina tíð, tá er einki samband eftir millum Føroyar og Danmark. Tá er loysingin veruleiki.

Hví koma eingi tøl á borðið frá tykkum, sum eru so yvirdrivin national, sum vísa, hvussu føroyska húsarhaldið kemur at síggja út, tá Føroyar eru ein fríur statur, sum tað verður rópt, um vit skulu vera við? Tað er nakað, tey ungu hava brúk fyri at síggja.

Vit, ið eru tilkomin og blivin gomul, nýtast eingi tøl. Vit duga fasittið uttanat.

Havi ført tað fram áður, vit fáa onga náðigávu frá Danmark. Tað, ið kemur frá Danmark, er okkara partur frá danska kongaríkinum.

# Góðu veljarar

Val



RODMUNDUR NIELSEN
Fólkatingsvalevni Fólkafloksins

Sum valevni fyri Fólkaflokkin til danska fólkatingið, fari eg eins og undanmaður mín, ikki at luttaka í reinum donskum tingmálum, men fari at fylgja væl við øllum teim málum, sum viðgjørd verða, ið viðkoma føroyum, og tala søk føroyinga á ein virðuligan hátt, á danska fólkatingi. Fari á ongan hátt, at draga føroyskan suverenitet til debat á danska fólkatingi, tað skal bert avgerast á føroya løgingi, í tráð við ta yvirtøku lóg, ið er galdandi millum londini, og er eisini skilabesta gongda á sjálvstýrisleið, til ein føroyskan suverenitet, ið vit eisini hava fingið prógv fyri við teimum yvirtøkum ið framdar eru eftir hesi lóg. Nevnast kann fólkakirkjan, ið Fólkaflokkurin hevur haft um hendi, og í bestu semju við danska fólkatingið, hava yvirtikið. Allar yvirtøkur ið samtyktar verða á føroya løgtingið, fari eg í sátt og semju við fólkatingið at avgreiða á skilabesta hátt, sambært yvirtøkulógini, og ikki sum Tjóðveldisumboði á danatingið, at sparka opnar hurðar, og sostætt heldur einki úrslit. Góðu veljarar fari tí fjølment á val og velji tvey fólkafloksumboð á danating, tá eru áhugamál føroyinga í góðum hondum á danska fólkatingi.

Gott Fólkafloksval.

# Vinaráð til Kaj Leo Johannesen

Kaj Leo Johannesen hevur verið frammi nú í seinastuni, har hann samanber ríkisfelagsskapin við ein urtagarð, ið hevur tørv á kærleika og røkt, um hann skal blóma.
Míni ráð skulu tí verða.
Far niðan í Balslev Timburhandil.
Har hava tey eitt evni, ið eitur "Roundup" til urtagarðsbrúk.
Havi sjálvur havt sera góðar royndir við evninum.

**John Berg**
**Hvalba**

Sosialurin
Sosialurin i